# Slógvið til heiður og æru

**Tað skulu vinnast pengar burtur úr fiskaslógvi. Høvd og ryggir verða turkað í Leirvík og seld til Nigeria. Framleiðslan byrjar væntandi í summar**

TURKIVIRKI
*Edvard Joensen*

**Leirvík:** Eini 28.000-30.000 tons av føroyskum fiskahøvdum fara árliga mestsum fyri einki, meðan onnur lond flyta hesa vøruna út fyri hundraðtals milliónir. Men nú fara føroyingar eisini at gagnnýta hesa vøruna.

Beint norðan fyri brennistøðina hjá IRF á Hagaleiti stendur ein virkisbygningur, har nógv lív er í løtuni. Ikki orsakaða av framleiðslu, men tí at menn eru við at gera hann kláran at fara undir framleiðslu. Nýggja framleiðslu her hjá okkum.

Tað er virkið hjá felagnum Atlantic Marime Products, sum fer at turka fiskahøvd og ryggir til útflutnings. Í sam bygningi, sum fyri nøkrum árum síðan varð bygdur til livravirkið hjá spf. H. Konoy

Tað ganga menn og stoypa gólv í ovaru hæddini inni í bygninginum. Ein betongbilur stendur uttan fyri og letur betong renna gjøgnum eina slisku inn gjøgnum vindeyga, har onkur spreiðir út við spaka, meðan aðrir slætta við eini fjøl.

Ígjøgnum eitt duraglopp sæst inn í aðra høll, har bara hálvt gólv er í ovaru hæddini. Har eru nakrir mans í ferð við at fylla okkurt upp á ein lastbil í niðaru hæddini. Fari oman um. Vænti at hitta stjóran har.



*Eirikur á Húsamørk fer við góðum treysti undir nýggju framleiðsluna og væntar sær nógv av samstavinum við íslendingar*

*Mynd: Edvard Joensen*

### Íslendskar royndir

Eirikur á Húsamørk situr inni í húsinum á lastbilinum. Hann bakar bilin út um og kemur so at práta.

Her larmar nakað illa til at fáa eina líkinda samrøðu. Onkur smiður gongur og tekur sundur eitthvørt, sum beinast skal burtur, so vit fara upp í matstovuna at seta okkum.

Eirikur á Húsamørk greiðir frá, at hugskotið til at fara at turka fiskaslógv kom á eini marknaðarferð hann var í Íslandi herfyri. Har hitti hann menn, sum hava turkað høvd og ryggir í Íslandi í fleiri ár. Teir komu í tal og hann greiddi teimum frá virkinum, sum stóð tómt í Leirvík.

Teir vóru sera áhugaðir, greiðir hann frá, og longu eina viku eftir vóru teir í Leirvík og hugdu at virkinum.

Síðan hevur tíðin gingið við at fáa fígging og gera virkið klárt til framleiðslu. Fígging er fingin frá Norðoya Sparikassa og Útnorðurgrunninum.

Talan er um eitt felag, sum føroyingar og íslendingar eiga helvt um helvt. Partapeningnurin er fýra milliónir krónur.

Fyrimunurin við at arbeiða saman við íslendingum á hendan hátt, sigur Eirikur á Húsamørk, er, at teir longu í nógv ár hava turkað og selt fiskaslógv. Tí ber til við hesum nýggja virkinum bara at fara í gongd og njóta gott av royndunum hjá íslendingunum. Tað metir hann sparir eini fimm ár ella so í barnasjúkum.

Lidna vøran verður øll seld til Nigeria, har hon verður nýtt til at gera fiskasúpan av. Hann væntar ein umsetning upp á einar 20 milliónir krónur árliga, sigur Eirikur á Húsamørk.

Tað byggir hann á, at tað koma eini 28.000-30.000 tons av høvdum frá føroysku fiskavirkjunum árliga. Hetta fer sum er mestsum alt í kvørnina hjá Havsbrún.

Stjórin á nýggja turkivirkinum í Leirvík heldur tað vera ov vánaligt, at føroyingar, sum siga seg at vera framkomna fiskivinnutjóð, bara fáa eina úrtøku upp á kanska eini 40 prosent burtur úr fiskinum. Við at turka høvd og ryggir til útflutnings, væntar hann at hækka úrtøkuna mun andi.

Virkið í Leirvík fer væntandi at kunna taka í móti umleið 6.000 tonsum árliga, og tað fara eini 20 fólk at arbeiða á virkinum. tá tað fer í gongd vónandi i juni, sigur Eirikur á Húsamørk, stjóri.

Høvdini verða tikin ínn í eina goymslu og løgd á plastikkristir, sum settar verða til turkingar hvør oman á aðrari. Høvdini verða so forturkað í tveir dagar, fyri síðan at verða stoytt í kassar við ótøttum botni, sum aftur verða settir hvør oman á annan í eini stórari turkihøll. Alt veður turkað við luft, og hitan fer virkið at fáa frá brennistøðini hjá IRF, sum er granni.

Men áðrenn byrjað verður, skal virkið eisini byggjast út. Ein køligoymsla og ein móttøka skulu gerast.

Hetta kostar nógvar pengar, sigur Eirikur á Húsamørk, uttan tó at vilja út við, hvat samlaði kostnaðurin verður. Men bara maskinurnar fara at kosta hálvasjeyndu millión, sigur hann tó.



*Nakað væl av umbyging skal til, áðrenn virkið er klárt at byrja*

*Mynd: Edvard Joensen*

### Lýsivirkið fór

Vit standa í gamla lýsivirkinum, sum nú verður gjørt til turkihús. Og tað, Eirikur í áðni koyrdi út úr høllini í lastbilinum, var partur av lýsiverksmiðjuni, sum nú bara veður niðurløgd.

– Amboðini verða beind av vegnum. Men er onkur, sum hevur hug at keypa, selja vit beinanveg, sigur Eirikur á Húsamørk.

Hann letur at, at hendan royndin við lýsinum kostaði honum væl av pengum. Men kortini hevur hann áræði til at byrja aftur.

– Tann seinasti idioturin er ikki føddur enn, heldur hann fyri við einum skeivum brosi.

Hann harmast tó um, at ikki bar til at fáa lýsiframleiðsluna rættiliga í gongd. Men tað var ikki nóg stórur áhugi millum fiskimenn at taka livur, og so var ikki annað at gera enn at lata aftur.

Tað var nú spell kortini, heldur Eirikur á Húsamørk. Tí teir komu ongantíð rættiliga í gongd við at góðska lýsið. Teir seldu rávøru fyri átta krónur kg., sigur hann. Meðan tann lidna vøran verður seld fyri 120,- kr, kg.

Men so langt kom virkið í Leirvík ongantíð. Stutt og greitt tí ov lítið av rávøru fekst.



# Barsilsskipanin loksins veruleiki

**1. juni í ár verða allir kvinnuligir løntakarar loksins javnsettir undir barnsburðarfarloyvi**

BARSILSLØN
*Turið Kjølbro*



*Gott og væl 600 børn verða fødd á hvørjum ári í Føroyum, 13 prosent av teim føðandi kvinnunum hava ikki tilknýti til arbeiðsmarknaðin, og útreiðslugrundarlagið undir nýggju barsilsskipanini er sostatt uml. 550 kvinnur*

*Myndin er tilvildarliga vald*

Nýggja barsilsskipanin varð samtykt á tingi týsdagin, men líka til tað síðsta komu broytingaruppskot, sum kortini øll fullu. Skipanin varð samtykt við teimum broytingum, sum vinnunevndin hevur skotið upp.

Tað var beint upp undir jól, at landsstýrismaðurin í vinnumálum legði fyri tingið uppskot um nýggja barsilsskipan galdandi fyri allar kvinnuligar løntakarar á arbeiðsmarknaðinum. Síðani hevur landsstýrismaðurin heitt á nevndina um at gera eina røð av broytingum í lógaruppskotinum, í flestu førum eftir tilmæli frá Arbeiðsloysisskipanini. Flest allar av tekniskum slag, sum gera innkrevjingarháttin einfaldari og minni arbeiðskrevjandi.

Fyrsta viðgerð av uppskotinum var miðskeiðis í januar, uppskotið varð beint í vinnunevndina og í farnu viku legði ein samd vinnunevnd álit fyri tingið. Við triðju viðgerð varð uppskotið samtykt, slakar tveir mánaðir áðrenn tað kemur í gildi.

Við nýggju skipanini fáa allar kvinnur á arbeiðsmarknaðinum fult endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barnsburð. Skipanin umfatar bæði kvinnur og menn, soleiðis, at kvinnum verður rindað endurgjald í fýra vikur áðrenn barnsburð, og kvinnum og monnum í 24 vikur eftir barnsburð, umframt tvær vikur, sum serliga eru tilskilaðar monnum. Við hesi skipanini hava pápar tiskil møguleikan at vera heima hjá barninum fyrstu tíðina, og tað er ein stórur bati í mun til galdandi skipan, tí tað hava teir ikki havt áður. Foreldur, ið ættleiða barn, hava rætt til barsilsfarloyvi í sama mun, sum tey hava rætt til barsilspening.

Mett verður, at árliga útgjaldið frá skipanini vegna barnsburð og ættleiðing til mammur og pápar verður uml. 44-46 mió. kr., ella 81.107,- fyri hvørt barnið. Verða uml. 25 mió. kr. fíggjaðar yvir vanliga skattin, eru eftir at fíggja uml. 21 mió. kr. Til fígging av meirkostnaðinum verður eitt prosentgjald lagt á A-inntøkur uppá 0,25%, sum løntakarar móttaka og sum arbeiðsgevarar rinda, ella tilsamans 0,50%. ALS skal umsita barsilsskipanina, og verður mett, at kostnaðurin av umsitingini verður uml. 1,8 mió. kr. árliga. Fyrsta árið verður kostnaðurin tó uml. 2,8 mió. kr., við tað at byrjanarkostnaðurin verður mettur til 1 mió. kr.






# Víkingar hittast á ólavsøku

**Fyrsta altjóða víkingalegan við luttøku av handverkarum, tónleikarum, bardagamonnum, inuittum og indiánum verður hildin í Havn á ólavsøku**

STEVNA
*Turið Kjølbro*

Á ólavsøku í ár verður stórur víkingamarknaður á Glaðsheyggi í Havn. Hetta stendur at lesa í blaðnum hjá Føroya Heimavirkisfelag, ið júst er komið. Tað er føroyska samtakið Siðsam, ið stílar fyri saman við fólki av Fjørukrónni í Hafnafirði. Tiltakið er partur av samstarvi millum Grønland, Ísland og Føroyar, og kemur at líkjast víkingahátíðini, ið var í Grønlandi í sambandi við stóra 1000 ára hátíðarhaldið.

Umleið 50 gestir úr 12 londum eru bodnir at taka lut. Eisini fólkasløg, ið høvdu samband við víkingarnar fyri 1000 árum síðani, verða við á leguni. Á marknaðinum vera handverkarar av ymsum slag, tónleikarar sum framføra upprunaliga víkingatónleik, inuittar, sum framføra trummudans, og kanska eini indiáni eisini.

Fimtan bardagamenn vera eisini við. Hetta er ein altjóða hópur, ið er vanur at ferðast runt um í Europa og berjast. Leggjast skal atturat, at hesir eru vanir við at hava ein høviskan atburð eftir framførsluna. Føroyski dansurin verður eisini umboðaður.

Víkingatiltøkini vórðu upprunaliga gjørd út frá teirri hugsjón at geva børnum innlit í søgu okkara, og royndir frá hinum víkingalegunum vísa, at børnum dámar ógvuliga væl at royna seg á legunum. Tí verður eisini undirhald, serliga til børnini og tey fáa høvi at royna seg í bogaskjóting, teymaríðing, siglíng, vápnaleiki, matgerð og framleiðslu av prýðislutum.